Landssjúkrahúsið



# Doyving

## Doyving

Tú skalt fasta fyri skurðviðgerð

Fyri

skurðviðgerð…………………………………………………………………3

## Á skurðdeildini

Full doyving

Lokal doyving

Rygg doyving……………………………………………………………..4

## Eftir skurðviðgerðina

Vitjan í viðrakningarstovuni……………………………………………….5

## Kunning um doyving

Er doyving vandamikil?

Hvørjar fylgjur kunnu koma í samband við ryggdoyving?

Hvussu við spýggju í samband við doyving?

Hvussu við pínu eftir skurðviðgerðina……………………………….6

Keldur……………………………………………………………………………..7

## Doyving

Í sambandi við innlegging á Landssjúkrahúsinum verður ein sjúklingajournal skrivað. Anestesilæknin lesur hana og kunnar seg um tína heilsu, hvønn heilivág tú tekur og møguligt ovurviðkvæmi, umframt rúsdrekka–og roykivanar.
Hesar upplýsingar hava týdning fyri, hvørja doyving tú skalt hava. Hevur tú verið doyvd/-ur fyrr og hevur havt hjáárin av doyvingini, er umráðandi at tú greiðir frá hesum.
Anestesilæknin ger av, hvørja doyving tú skalt hava.
Hevur tú spurningar viðvíkjandi doyving, kanst tú umvegis sjúkrarøktarfrøðing á deildini fáa samband við anestesilækna.

## Tú skalt fasta fyri skurðviðgerð!

Tað er sera umráðandi, at magin er tómur fyri skurðviðgerð. Annars er vandi fyri at spýggja undir doyvingini.
Tú skalt einki eta 6 tímar undan skurðviðgerðini, tó kanst tú drekka 1-1½ glas av vatni ella saft  2 tímar undan doyvingini.
Royking:
Tú mást ikki roykja 6 tímar fyri skurðviðgerðina, tí hetta økir um slím í andaleiðini.




## Fyri skurðviðgerð

Vanliga fært tú pínutablettir fyri skurðviðgerðina og um neyðugt eisini sissandi heilivág.
Tekur tú heilivág dagliga, skalt tú bert taka hann, um anestesilæknin ella læknin hevur givið boð um tað.
Brúkar tú brillur, hoyritól ella hevur tú tannprotesu, skalt tú hava tey við á skurðgongina; tað er lættari at samskifta við teg, og starvsfólkið hevur tey í varðveitslu, meðan skurðviðgerðin fer fram.

Tú skalt ikki hava tað niðanfyrinevnda við:

- Pening
- Ur, ringar, hálsketur, oyraringar og aðrar sprýðislutir
- Kontaktlinsur
- Smyrsl og neglalakk





## Á skurðdeildini

Sjúkrarøktarfrøðingar á anestesi- og operatiónsdeildini taka ímóti tær og spyrja um navn, føðingardag, ovurviðkvæmi  o.a. Hetta verður gjørt fyri at tryggja allar neyðugar upplýsingar um teg.

Inni á skurðstovuni kemur tú at liggja á skurðlegu. Síðani verður ein plastnál, eitt sonevnt dropp, lagt í eina æðr í arminum, so at saltvatn og neyðugt medisin kann verða givið til doyvingina. Blóðtrýstmasjett verður løgd um yvirarmin, klisturmerki, elektrodur, verða sett á bringuna til yvirvaking av hjartanum. Eisini verður ein súrevnismátari settur á fingurin.

Tá hetta er gjørt, er klárt at doyva til fulla ella lokala doyving.

**Full doyving:** Sjúklingurin svevur

Doyvandi medisin verður sprænt í droppið og tú sovnar eftir lítlari løtu. Tú svevur undir allari skurðviðgerðini uttan at kenna pínu.

Tá skurðviðgerðin er av, vekja vit teg úr doyvingini og geva tær pínustillandi medisin.

Frá skurðstovuni verður tú flutt/-ur í viðrakningarstovuna.

**Lokaldoyving:** Doyving av likamslutinum/-staðnum, ið skal skurðviðgerðast. Sjúklingurin svevur ikki.
Í sambandi við doyving av einum avmarkaðum øki, verður doyvandi medisin sprænt beinleiðis í tað staðið, ið skal skurðviðgerðast, t.d. eina hond ella í ein arm.
Eftir hesa doyving verður sjúklingurin aloftast fluttur aftur á seingjadeildina, annars fluttur í viðrakningarstovuna.

**Ryggdoyving:** Í sambandi við ryggdoyving verður lokaldoyvandi medisin sprænt inn í ryggin (spinal – ella epiduralrúmið), har tað blokerar nervarnar og soleiðis doyvir tann partin av kroppinum, ið skal skurðviðgerðast í uml. 3-4 tímar.
Sjúklingar, ið eru ryggdoyvdir, verða fluttir í viðrakningarstovuna.



Í sambandi við lokaldoyving ert tú vakin og uttan pínu, meðan skurðviðgerðin fer fram. Tó kann merkjast, at nortið verður við viðgjørda staðið. Er neyðugt, kanst tú fáa sissandi medisin, so tú durvar eina løtu.
Á anestesideildini hava vit ein Ipod, so høvi er at lurta eftir tónleiki, meðan skurðviðgerðin fer fram.

## Eftir skurðviðgerðina

Tá skurðviðgerðin er av, verður tú flutt/-ur í viðrakningarstovuna ella beinleiðis á seingjadeildina.

Í viðrakningarstovuni er sjúkrarøktarfrøðingur, sum alla tíðina hyggur, hvussu tú hevur tað: Tú fært eitt katetur í nøsina við súrevni, blóðtrýst, hjartasláttur, andadráttur, møgulig pína og vaml verða kannað. Er neyðugt verður viðgjørt við medisini.

Tá tú ert heilt vakin og hevur tað gott, verður tú flutt/-ur frá viðrakningarstovuni og aftur á seingjadeildina.

Kunning um skurðviðgerðina ella kanningina fært tú, tá tú ert komin aftur á seingjadeildina.

## Vitjan í viðrakningarstovuni

Viðrakningarstovan hevur bert fimm seingjarpláss og tað ger, at ikki er gjørligt at bjóða avvarðandi at sita hjá vaksnum skurðviðgjørdum sjúklingum.

Bert tá talan er um børn og annars sjúklingar við serligum tørvi, eru avvarandi vælkomin at sita hjá teimum.





## Kunning um doyving

### Er doyving vandamikil?

Tað er trygt at verða doyvdur. Vælútbúgvið starvsfólk innan anestesi er alla tíðina hjá, meðan skurðviðgerðin fer fram. Er annað áfatt, enn tað ein skal skurðviðgerast fyri, t.d. hjartasjúka, er váðin  eitt sindur størri fyri, at komplikatiónir kunnu koma fyri í sambandi við doyvingina.  Um so er, greiðir anestesilæknin tær nærri frá váðanum

### Hvørjar fylgjur kunnu koma í sambandi við ryggdoyving?

Tað eru fá, færri enn tvey %, ið fáa høvuðpínu í sambandi við ryggdoyving, eisini rópt spinal-anestesi.  Viðgerðin fyri slíka høvuðpínu er í flestu førum seingjarlega, ríkiligt at drekka og høvuðpínutablettir. Er høvuðpínan serliga ring, kann anestesilæknin viðgera hesa.



### Hvussu við spýggju í sambandi við doyving?

Tað eru sjúklingar, ið hava vaml og eisini spýggja í sambandi við doyving, men við medisini  ber til at viðgera henda trupulleikan.

### Hvussu við pínu eftir skurðviðgerðina?

Anestesilæknin ger eina ætlan um, hvørja pínuviðgerð tú skalt hava eftir skurðviðgerðina. Pínuviðgerðin byrjar, meðan tú enn ert doyvd/-ur.





## Keldur

- Anestesi/ Bedøvelse
  Patientinformation til voksne   Revideret januar 2002
  Anestesi - og Operationsklinikkerne
  H.S. Rigshospitalet
  Blegdamsvej 9
  2100 København Ø

- Epidural Smertebehandling
  H.S. Rigshospitalet- Hovedstadens Sygehusfællesskab

- Anestesideildin
  Landssjúkrahúsið
  J.C. Svabosgøta
  100 Tórshavn



Landssjúkrahúsið

tel 304500, www.ls.fo